# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Hillary: Diplomati heldur enn vápnamegi

Í gjár vóru lidnir tjúgu dagar, síðan álopini á Gaza byrjaðu. Sum pressan um allan heim hevur víst á, er tað sivilfólkið, sum meinast verður rakt. Sjáldan hevur heimur sæð eina hernaðaratgerð, har atgerðirnar mestsum beinleiðis eru vendar móti sivilfólkinum. Teir tjúgu dagarnir hava kostað meira enn túsund fólkum í Gaza lívið – av hesum eru 327 børn.

Tað ljóðar, at útlitini fyri vápnahvíld eru batnandi, hetta serstakliga eftir, at ST av álvara er farið inn í friðarsamráðingarnar. ST aðalskrivarin hevur av øllum alvi roynt at leggja trýst á partarnar til tess at fáa teir at góðtaka uppskotið hjá Egyptalandi um vápnahvíld. Nú ljóðar, at partarnir eru sinnaðir fyri vápnahvíld, spurningurin er bert nær tað passar báðum pørtum best at taka hesa vápnahvíldina.

Uppskotið fevnir um eina fyribils vápnahvíld, sum skal tryggja humanitera hjálp til fólkið í Gaza og í øðrum lagi fevnir uppskotið um eina varandi vápnahvíld, sum m.a. fevnir um eina friðaravtalu millum Hamas og Fatha stjórnina í Ramallah. Fyrst tá politisku viðurskiftini í teimum sjálvstýrandi palestinensisku økjunum eru komin í rættlag, kann farast undir at samráðast um eina skipan, sum fevnir um Hamas viðurkenning av statinum Ísrael. Eisini fevnir uppskotið um, at tann avbyrging, sum hevur gjørt lívið so strævið hjá fólkinum í Gaza, verður avtikin. Ein meginfortreytin fyri øllum hesum er sjálvsagt, at Hamas gevst við rakettálopunum inn í Ísrael.

Dúgliga verður roynt at kanna allar møguleikar fyri friði. Ymist bendir á, at partarnir eru áhugaðir. Báðir partar eru undir tíðartrýsti. Hamas er áhugaðir fyri vápnahvíld, tí gazabúgvar nú eru komnir at markinum fyri tí, sum menniskju kunnu tola. Samfelagnum trýtur alt: brenni, heiluvág, vatn, ravmagn, gass og alt vanligt samfelagsvirksemi er steðgað. Hetta er serstakliga galdandi fyri heilsu- og útbúgvingargeirarnar. Ísrael er undir tíðartrýsti, tí Obamadagur nærkast í hvørjum. Tann tjúgunda januar tekur Obama við sum forseti, og hetta skiftið fer alt annað líka at merkja, at Ísrael ikki fær eins rúmar ræsur í sínum hernaðarpolitikki mótvegis arabisku grannunum. Komandi amerikanski uttanríkisráðharrin Hillary Clinton gjørdi í vikuni púra greitt, at uttanríkispolitikkur USA nú fer at byggja á vit og skil, humaniterar meginreglur og fyrilit fyri altjóða friði. Politikkurin fer sostatt ikki at byggja á tey neokonservativu ideologisku virði, sum hava myndað hugsjónarstøðið undir uttanríkispolitkkinum hesi seinastu átta árini. Hesi orð eru eitt greitt signal til eitt nú Ísrael og aðrar vinir USA um, at hereftir skal diplomatiið og ikki vápnamegin tala. Alt hetta bendir á, at vit nærkast eini vápnahvíld í tí hart plágaða Gazaøkinum, har tað verður brúk fyri humaniterari hjálp. Uttan mun til, hvat vit føroyingar annars halda um Hamas, so eiga vit at lata okkara til tess at linna neyðina hjá okkara medmenniskjum, tí vanliga fólkinum í Gaza.

**Sosialurin**

## Frels okkum frá okkum sjálvum

**HØGNI HOYDAL**



**Javnaðarflokkurin sker niður hjá veikastu pensjónistunum og einkjubørnum, steðgar íløgum í útbúgving og mentan og rekur nú aftur reinan fólkaflokspolitikk. Kortini sendir flokkurin nú út tíðindaskriv um samhaldsfesti og vinnupolitiskar broytingar. Tað man vera ársins andsøgn**

Undir ABC-dýnuni í føroyskum politikki verður ongin settur til svars ella til ábyrgdar fyri sínar gerðir. Tískil sleppa ABC-flokkarnir at siga hvat sum helst, geva øðrum skuldina fyri egin mistøk og egna ómegd og at tosa beint ímóti sínum egnu gerðum.

**Ábyrgdin liggur altíð hjá onkrum øðrum**

Landsstýrisfólk – ið sambært lóg hava fulla ábyrgd av at fyrisita á sínum málsøki – sita dagliga í fjølmiðlunum og harmast um avgerðirnar á teirra egnu málsøkjum og geva øðrum skyldina, hóast tey hava eina sonevnda breiða samgongu við 20 tinglimum. Høvuðsboðskapurin hjá teimum, ið sum ráðharrar eru vald at leiða landið er: Eg vildi gjarna gjørt okkurt, men hini vilja ikki! Ella: Nei, hetta er ikki mítt øki, spyr onkran annan í landsstýrinum. Ella: spyr eina nevnd, ið vit hava sett av embætisfólki. Haldi ikki, at vit enn hava hoyrt nakað av teimum 9 fólkunum í landsstýrinum havt nakra meining ella ætlan um sítt málsøki. Hinvegin hava tey sterkar meiningar um málsøkini hjá hinum, nevniliga tá tey siga nei. Sum tá Fólkaflokkurin og síðani sambandsflokkurin prika hol á allar luftballónirnar hjá javnaðarfólki.

Serliga stuttligur er sum so ofta Hans Pauli Strøm. Í 4 ár hava hann og javnaðarflokkurin sitið á almannamálum og hava hækkað útreiðslurnar við fleiri hundrað milliónum. Fyrst og fremst orsakað av vantandi stýring, tí ringt er at síggja nakað aftur til hesar pengarnar, hjá teimum sum tørva. Tilvitað hevur javnaðarflokkurin steðgað útleggingini av eldraøkinum til kommunurnar, sum semja var um, áðrenn javnaðarflokkurin kom í landsstýrið í 2004 og sum er tað einasta, ið hevði kunnað loyst akutta røktartørvin. Men nú Rósa Samuelsen hevur arvað upptakið frá Hans Paula, fer hann í bløðini og krevur eina loysn fyri teir mongu røktarsjúklingarnar á Landssjúkrahúsinum og leggur ábyrgdina á Rósu.

**...egndu fyri sær sjálvum**

Undir fíggjarlógarviðgerðini gjørdu ABC-flokkarnir av, at teir pensjónistar, ið bert hava fólkapensjón at dúva uppá, skuldu gjalda lutfalsliga størsta prísin fyri skattalættarnar hjá fólkaflokkinum og undirskotið á fíggjarlógini. ABC-flokkarnir tóku eisini burtur stuðulin til eldratilhald kring landið. Og enntá tóku teir 33.000 krónur frá einkjubørnum og grundgóvu við skelvandi rødd fyri, at hetta var neyðugt orsakað av altjóða fíggjarkreppuni (!).Harafturat slepti samgongan øllum teimum bjørtu samtyktunum hjá CHE-samgonguni um útbúgving, gransking og mentan.

Upp undir triðju viðgerð sótu samgongufólk og samráddust út á náttina. Vit trúðu veruliga, at nú var onkur sosial sál vaknað og onkur, sum tordi at taka undir við uppskotunum frá Tjóðveldi um, at tey vælbjargaðu mugu gjalda meira, meðan veikastu bólkarnir, umframt útbúgving og mentan skulu mennast.

Og jú. Eitt broytingaruppskot kom frá samgonguni. Jóannes Eidesgaard, Jóhan Dahl, Jacob Vestergaard og Hans Pauli Strøm høvdu sligið nevan í borðið ímóti niðurskurðum. Niðurskurðum hjá hvørjum? Ja, hjá sær sjálvum! Teir fýra fingu eina millión meira í part til sínar egnu fyrisitingar. Almannaøkið hjá Rósu Samuelsen og mentan og útbúgving hjá Helenu Dam á Neystabø fingu ikki inn í eygað, og har sló ongin nevan í borðið.

Peningurin, sum teir fýra avgjørdu landsstýrismenninir fingu til sína egnu fyrisiting, var á leið sama upphædd, sum tann, ið varð skorin hjá fólkapensjónistum og einkjubørnum. Og eisini sama upphædd, sum Fróðskaparsetrið tørvar til tess at halda fram við menningarætlanini, sum CHE-samgongan setti í verk.

**Ævigheitsmaskinan hjá Javnaðarflokkinum**

Og hvat sigur javnaðarflokkurin um hetta?

Jú, Gerhard Lognberg fer í bløðini og fær fría talutíð á Rás2 at skelda um avgerðirnar og tosar um at verja tey lágløntu í Føroyum. Men hann sat sjálvur trúliga og atkvøddi saman við øllum javnaðarflokkinum og samgongulimum fyri øllum tí, sum hann nú skeldar um. Og javnaðarflokkurin feldi øll tey meira enn 60 broytingaruppskotini hjá Tjóðveldi, sum høvdu bøtt um samhaldsfestið, gagnað útbúgving, mentan og umhvørisvernd og broytt fiskivinnupolitikkin. (Tey, ið vilja hava sjón fyri søgn kunnu hyggja á www.logting.fo

Síðani fer Javnaðarflokkurin á sonevndar innahýsis fundir og sendur eitt tíðindaskriv til fjølmiðlarnar, har tey boða frá samhaldsfesti og einum nýggjum fiskivinnupolitikki (!).

Í heimastýrisábyrgdarloysinum hevur Javnaðarflokkurin sostatt uppfunnið ævigheitsmaskinuna: Í verki rekur hann reinan fólkaflokspolitikk við asosialum skattapolitikki og vinnupolitikki fyri tey úrvaldu. Tá hesin politikkur hevur skapt risaundirskot og búskapartrupulleikar, velur hann at skerja almannaøkið, veikastu pensjónistarnar, útbúgving og gransking – og sjálvt einkjubørnini. Síðani skeldar hann inn á sínar egnu avgerðir og bjóðar seg fram at verja fólk móti avleiðingunum av sínum egna politikki. Javnaðarflokkurin bjóðar seg fram at frelsa okkum frá sær sjálvum.

Lesið Sosialin - so eru tit við

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo
Bergur Johannesen bergur@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Harald í Kálvalíð harald@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.